## 9. kommunulæknin

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, hevur avgjørt at seta Kára Jacobsen, kommunulækna, í starv sum 9. kommunulæknan í Suðuroyar læknadømi
Kári Jacobsen er 41 ára gamal. Hann hevur lokið læknaprógv 1990, fekk góðkenning til sjálstøðugt virki sum lækni í 1992, og fekk serlæknagóðkenning í Almen medisin 1998.
Hann hevur hesar royndir sum kommunulækni nú hann tekur við starvinum í Suðurstreymoy væntandi frá 1. oktober 2001:
Var praksishjálparlækni í Eiðis læknadømi 6 mðr.
Hevur nú starvast sum kommunulækni í Sandoyar læknadømi síðani 01.09.95. fyrst sum amanuensis, síðani sum avloysari, og aftaná at hava fingið góðkenning sum serlækni í Almen medisin, í føstum starvi.

# Nýggj andlit á marknaðardeildini

Marknaðardeildin á Sosialinum hevur fingið tvey nýggj andlit. Tær eru 33 ára gamla Finnbjørg Nattestad úr Havn og 20 ára gamla Anja Weihe úr Kollafirði.
Sjónleikaráhugað í Føroyum kenna Finnbjrøg. Hon hevur seinastu fýra árini arbeitt sum skrivstovukvinna hjá MÁF, meginfelagnum hjá føroysku áhugaleikarunum.
Anja er kend í fótbóltsheiminum sum sum leikari í B36.
Gudny Langgaars og Marjum Dalsgaard, sum seinasta árið hava mannað marknaðardeilgina saman við Jonhard Hammer, fara nú uttanlands at lesa. Marjun fer til Danmarkar og Gudny til London.



*Myndin, sum eisini var á forsíðuni í gjár sýnir frá vinstru Finnbjørg og Anju. Myndin var modellmynd í gjár og tær hava einki við nethandilin av heilsuvørum at gera. Mynd: Álvur Haraldsen*






## NØVN Í VIKUNI

# Mindeord um John Sivertsen

**f. 10.9.1923 – d. 1.4.2001**



Nu er det allerede nogle måneder siden, at abbi døde. Men det er først nu, at vi virkelig føler savnet. Hver gang vi er i Gjógv, savner vi abbis gode humør og mange historier.
Abbi var en farverig person, som ikke var bange for at være anderledes. Det han mente var ret og rigtigt, fulgte han, uanset om han brød med traditionerne. Denne indstilling var ikke altid lige nem i et lille samfund.
Abbi var et menneske, som elskede at sætte ting i gang. Han havde hjertet på rette sted, når det gjaldt hans medmennesker.
Som ét af børnebørnene skrev hjem fra Singapore i et brev til omma: »Jeg vil huske abbi i jakkesæt og praktiske Eccosko eller i store gummistøvler og arbejdstøj. En glad mand med store armbevægelser og en rungende smittende latter. Abbi kan kærligt karakterfuld næse, der minder um fuglens næb. Barsk og farverig og ikke bange for noget – og med en umættelig appetit på livet«.
Savnet er stort hos os alle, men dog mest hos omma. Abbi var til sin sidste dag nyforelsket i omma. Selv om de sidste par år var svære for abbi, hvor han forsvandt bort i et mørke, så var han i sine lyse stunder altid opmærksom på, hvor omma var.
Vi er taknemmelige for at have minderne om en god far, svigerfar, abbi og langabbi og lyser fred over hans minde.

Janne og Kristinn samt Tatjana, Natasha, Julian, Teresa og Maria Johnsson

# Minningarorð um Paula Holmsund av Kambsdali

Hvør setti seg í gangin at bíða tolin har
so góðlyntur og blíður, til fundur lokin var ?
Tað gjørdi bara Pauli, hann beyð sær sjálvur til
at hjálpa mammu síni at sleppa inn í bil.

Og hvør kom inn í køkin at bjóða pizzabreyð,
tá tíðin gjørdist langlig og svongjast tóku tey —
tað gjørdi Pauli stundum, so umsorgsfullur var,
um úti ella heima ein linna henni bar.

Hann lokkaði fram brosið á mongum mangan dag
við sínum skemtisøgum og altíð góða lag.
Hann fylti øll við gleði, sum stóðu honum nær.
Tey góðu minni lýsa hvønn dag so rein og skær.

At læra seg at smíða, tað hansar' ætlan var,
men arbeiða hann mátti og pening vinna sær,
við síni kæru gentu at fylgjast lívsins leið,
men mongum brestur ætlan, so lagað var tað ei.

Farvæl hann segði ommu og abba sínum her,
tey mundu ikki gruna, at tað var síðstu ferð,
hann fylgdi teim á flogvøll og smíltist móti teim,
fór sjálvur dagin eftir á ferð til annan heim.

Úr erva kemur hjálpin at grøða sorgarsár,
altroystar Gud kann troysta, tá sorgin kenst ov svár.
Ei uttan Hansar' vilja ein spurvur fellur her,
og mannabarn nógv meiri enn mangir spurvar er.

Í stovuni hjá Leilu so tómligt vorðið er,
tí sonurin er farin og fluttur út úr verð,
tann góða boðskap lærdi hann innanveggja har,
at Hann, sum vann á deyða, ígjøgnum alt tey bar.

Tann sami lívsins Harri, sum avger dagatal,
Hann troystar tey, sum syrgja, og tí tey eru sæl.
Til láns at bera aftur er lívið her á fold,
til lívs øll skulu rísa, sum hvíla undir mold.
Til Faðir ljóssins einans kann ljóða lov og takk
frá Honum øll góð gáva til okkum niður rakk,
fullkomna gávan Jesus tungt tekur okkum frá,
hjá Honum er ei broyting, ei skuggi fellur á.

Signað veri minni um Paula hjá Leilu.

Hanna



# Borgarstjórin mælir til samstarv

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur at tey smærri virkini í Klaksvík áttu at samstarva um tilboð til stórarbeiði í kommununi**

ARBEIÐI
*Eyðun Klakstein*

Smá virki, sum ikki einsamøll kunnu standa fyri stórum arbeiðum, áttu at samstarva um felags tilboð.
Tað heldur borgarstjórin í Klaksvík, sum sjáldan fær fleiri enn tvey tilboð frá virkjum í býnum, tá okkurt stórt arbeiði skal gerast í kommununi.
– Vit hava tvey stór byggivirki, sum klára seg útmerkað. Men tey hava ovmikið at gera, og tí hevði tað verið gott fyri okkum, um fleiri høvdu hug at bjóða upp á arbeiði í kommununi, sigur Steinbjørn Jacobsen.


*Borgarstjórin mælir til tættari samstarv millum virki á ymsum slagi í Klaksvík, so tey í felag kunnu gera stórarbeiði í kommununi*

Fleiri stór kommunal arbeiði eru í gongd í løtuni, og fleiri teirra eru vorðin nógv dýrari enn kostnaðarmetingin, tí øll tey stóru virkini í landinum hava so nógv at gera, og tað ávirkar prísin.

### Meira samstarv

Stóra umvælingin av svimjihøllini í Klaksvíkar gjørdist munandi dýrari enn ætlanin, og tað sama er galdandi við nýggjari útstykking á Helnabrekku.
Umframt hetta eru eisini onnur stór arbeiði í gongd. Skúlin á Ziskatrøð verður framhaldandi umvældur fyri nógvar pengar, og stór bygging er í gongd undir Kráarbrekku, har sambýli og eldraíbúðir verða gjørd.
– Vit fáa vanliga tilboð frá teimum báðum stóru virkjum í býnum, meðan tey smærru virkini ikki seta seg før at bjóða. Virki, sum hava nøkur fá fólk í arbeiðið, klára ikki at standa fyri stórum arbeiðum sjálvi, men tey áttu at samstarva meira, heldur Steinbjørn Jacobsen.
– Á tann hátt høvdu vit fingið fleiri tilboð til okkara arbeiði, og tær smáu fyritøkurnar kundu verið við í kappingini.


Royn lopfjølina

lønardeildini tørvar fulltrúa



Fulltrúar koma og fara. Nú er ein hjá okkum farin - í eitt leiðarastarv.

Vit hava aftur verið lopfjøl.

Nú sóknast vit eftir einum nýggjum fulltrúa at seta í hansara stað. Vit kunnu bjóða eitt mangan rokaligt og avbjóðandi umhvørvi, ið setir krøv og gevur royndir. Hevur tú royndirnar, ella vilt tú fáa tær, hava vit kanska brúk fyri tær.

Okkara landsstýrismaður umsitur fíggjarmál. Hann hevur leiklutin sum almennur arbeiðsgevari, og tí samráðast vit javnan um sáttmálar við eini 30 ymisk fakfeløg.

Men Lønardeildin hevur eisini nógvar aðrar uppgávur.
- Vit ráðgeva feløgum, aðalstýrum og stovnum, kunna tey og avgreiða fyrispurningar.
- Vit tulka lógir og avtalur.
- Vit gera verkætlanir og analysuuppgávur. Arbeitt verður eitt nú fram ímóti at fáa stovnum tilfar og vegleiðing á internetinum um starvsfólkarættarlig mál.

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur samfelagsvísindaliga kandidatútbúgving – helst í løgfrøði. Men tað mest umráðandi er, at tú hevur røttu eginleikarnar til starvið.

Royndir á økinum eru ongin treyt, tí vit skipa fyri upplæring og eftirútbúgving í millum annað fyristingarrætti, arbeiðsrætti og samráðingartøkni.

Hevur tú samfelagsliga kandidatútbúgving, eru setanarviðurskiftini eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og BLF.

Vit bjóða tær
- sjálvstøðuga ábyrgd frá fyrsta degi
- góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar
- royndir, sum eru góð berlast á yrkisleiðini
- liðiligar arbeiðstíðir
- gott arbeiðsumhvørvi og góðar samstarvsfelagar.

Hættar tú tær lopið? So send okkum eina umsókn við avriti av prógvum og ummælum.

Umsóknarfreistin er 31. august 2001, klokkan 12. Starvið verður sett so skjótt til ber. Men vit bíða gjarna eftir tær.

Vilt tú vita meira, kanst tú ringja til Thomas Magnussen, deildarstjóra, telefon 35 22 00.

Umsóknin skal sendast til:
Fíggjarmálastýrið
Lønardeildin
Postboks 2039
165 Argir

Fíggjarmálastýrið
Lønardeildin, Postboks 2039
165 Argir